## Havnarmaður skrivar dagbók

Dagbókin ”Memoirer og Autobiografi” verður løgd fram í sambandi við 100 ára haldið hjá Tórshavnar kommunu í Posthúshjallaranum hósdagin 29. januar kl 16:00.

Mentunnargrunnur Studentafelagsins gevur dagbókina út.

Tað er langabbasonurin Heri Kragesteen,ið leggur bókina fram fyri almenninginum.

**Skráin fyri tiltakið, sum er alment og ókeypis, er henda:**

Mads Andreas Winther, abbasonur fyrsta borgarstjóran í Tórshavnar kommunu, sigur frá

Heðin Mortensen, borgarstjóri, fær handað eintak av dagbókini ”Memoirer og Autobiografi”

Erland Viberg Joensen, søgufrøðingur, heldur talu um dagbókina hjá Sámali á Krákusteini

Tórshavnar manskór syngur

Sámal Tróndur Finnsson Johansen, landsskjalavørður, upprunahandritið til dagbókina ”Memoirer og Autobiografi” í varðveitslu

Síðani fæst kaffi





# Nú skal kommunumálið loysast

**Í seinasta lagi á ólavsøku skal nýstovnaða kommunala umskipanarnevndin, sum Annika Olsen, landsstýriskvinna, nú hevur mannað, koma við uppskoti um ein kommureform.**

Nevndin skal eitt nú koma við tilmæli um, hvørjar tær kommunalu eindirnar skulu vera, hvussu hesar skulu skipast og um eina javningarskipan millum kommunurnar. Eisini skal nevndin mæla til eina raðfesting av uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur, og hvussu ein møgulig blokkstuðulsskipan skal skipast.

Arbeiðsuppgávurnar hjá nenvdini eru hesar:

### Kommunueindir

Við støði í Løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur, skal nevndin koma við tilmæli um, hvørjar tær kommunalu eindirnar skulu vera, og hvussu hesar skulu skipast.

### Millumkommunal javningarskipan

Allar kommunur verða javntsettar mótvegis lóggávuni, t.e. at tær allar skulu loysa tær somu uppgávurnar. Við hesi javningarskipan skal miðast eftir, at allar kommunur eru figgjarliga førar fyri at loysa tær komm¬unalu uppgávurnar, sjálvt um umstøðurnar hjá teimum ikki eru tær somu. Javningarskipanin skal tí fevna um javning av muni í inntøkugrundarlagi pr. borgara og í útreiðslutørvi pr. borgara.

### Raðfesting av greiðum uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur

Allýsing verður gjørd av ábyrgdarøkjum, so sum eldraøkið, fólkaskúlin, vegakervið og aðrar uppgávur, sum kunnu flytast kommunum at umsita. Gerast skal ein ítøkilig raðfesting, ið ásetur hvørji økir, í hvørjari raðfylgju og nær hesi verða løgd til kommunurnar. Fyrsta stóra øki verður lagt til kommunurnar 1. januar 2011.

### Blokkstuðul

Ætlanin er ikki at broyta skattaskipanina, og skal nevndin gera uppskot um, hvussu ein møgulig blokkstuðulsskipan skal skipast, sum tryggjar, at figging er til tær uppgávur, sum verða fluttar til kommunurnar at umsita, tá tað ikki er gjørligt longur at broyta í býtinum millum lands- og kommunuskatt uttan at broyta skattaskipanina.

### Eftirmeting

Gjørd verður ein eftirmeting av, hvussu tað hevur eydnast at lagt dagstovnaøkið og barnaforsorgarøkið til kommunurnar. Harumframt skal gerast ein fastur eftirmetingarleistur til tey øki, sum verða løgd til kommunurnar at umsita.

### Kommunala umskipanarnevndin

Eyðbjørn Larsen, løgfrøðingur, Formaður
Ingibjørg Berg, stjórnmálafrøðingur
Jóan Petur Hentze, aðalskrivari, Kommunusamskipan Føroya
Eyðun Christiansen, ráðgevi, Føroya Kommunufelag
Doris Bjarkhamar, fulltrúi, Almannamálaráðið
Jenny Lydersen, undirvísingarleiðari, Mentamálaráðið
Sofus Debes Johannesen, fulltrúi, Fíggjarmálaráðið
Poula Árnadóttir Lervig, fulltrúi, Innlendismálaráðið
Hilmar Høgenni, deildarstjóri, Innlendismálaráðið


SKRIVSTOVUFÓLK

NSR-tænastan í Tórshavn søkir eftir skrivstovufólki.

UPPGÁVUR
- vanligt skrivstovuhald og skrivarauppgávur
- telefonavgreiðsla
- skjalaskráseting
- samskifti við viðskiftafólk

FØRLEIKAKRØV
- hóskandi útbúgving og arbeiðsroyndir
- tænastusinni
- góðan kunnleika til føroyskt
- góðan telduførleika
- góð samstarvsevni

VIT BJÓÐA
Eitt áhugavert, fjølbroytt og sjálvstøðugt starv við skiftandi uppgávum, herímillum samstarv við skúlar, dagstovnar, ráðgevar, Sernámsdepilin og tænastueindirnar.

NSR-tænastan í Tórshavn er nýggj deild undir Sernámsdeplinum, og tú verður við til at skipa og byggja upp virksemið saman við starvsfeløgunum.

Sernámsdepilin fer í næstum at arbeiða við elektroniskari skjalahandfaring. Upplæring fæst í hesi skipan.

NSR-tænastan er stytting fyri náms- og sálarfrøðiligu ráðgevingartænastuna hjá Sernámsdeplinum.

SETANARTREYTIR
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett og lønt eftir sáttmála millum Kommunala arbeiðsgevarafelag Føroya og Starvsmannafelagið.

UMSÓKNIR
Send umsókn við prógvum, c.v. og øðrum skjølum til

**NSR-tænastuna**
**Frælsið 30,**
**Postboks 3150**
**110 Tórshavn**
ella til **nsr@nsr.fo.**

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 30. januar 2009. Starvið verður sett skjótast til ber.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda tær til Harriet Hansen, samskipara, tlf. 212055, harriet@nsr.fo.

Sernámsdepilin veitir sernámsfrøðiliga ráðgeving til børn og ung frá 0–18 ár. NSR-tænastan hoyrir undir depilin og er skipað í øki kring landið. Sí www.snd.fo.

SND SERNÁMSDEPILIN

SENDISTOVAN